# Almenn móttøka

**Í samband við at Inga Ellingsgaard, Ingibjørg Jacobsen og Sverri Viderø fara frá vegna aldur, verður almenn móttøka í kantinuni á Óðinshædd 2 hósdagin 14. des. kl. 15 - 17.**

**Øll eru hjartaliga vælkomin.**





Postverk Føroya

## LÆRARI TIL KOLLAFJARÐAR SKÚLA

Søkt verður eftir einum lærara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi í tíðarskeiðnum 8. januar – 27. juni.

**Lærugreinir:**
føroyskt í 2. flokki
kristni í 1., 2. og 3. flokki
teld í 4. – 6. flokki
serundirvísing

**Aðrar uppgávur:**
telduvørður

Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Um eingin við útbúgving søkir, verður annað fólk sett ístaðin.

Starvið er fulltíðarstarv og er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlaleiðaran, Karin Hammer, á tlf. 30 25 53 ella 22 14 07 ella á teldupostbústaði karin.hammer@skulin.fo

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi **hósdagin 4. januar 2006 kl. 12.00.**

**Kollafjarðar skúli**
**Botnavegur 2**
**FO-410 Kollafjørður**

*Í Kollafjarðar skúla ganga í løtuni 144 næmingar í 1. til 9. flokki. 14 lærarar starvast í skúlanum. Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum. Vit arbeiða í 3 deildum við einum lærarattoymi í hvørjari deild.*
*Býtt er soleiðis: 1.-3. flokkur, 4.-6. flokkur og 7.-9. flokkur.*




### *Á TIMBURDEILDINI eru tvey størv sum faklærarar leys !*

- Av tí at virksemið á timburdeildini økist, sóknast vit eftir einum dugnaligum faklærara til **fast fulltíðarstarv.**
- Av tí at ein av okkara lærarum fer í farloyvi, sóknast vit eftir einum dugnaligum faklærara til **tíðaravmarkað fulltíðarstarv í 2 ár**.

Vit vænta:
- at tú hevur sveinabræv sum húsasmiður.
- at tú hevur eina framhaldandi útbúgving.
- at tú hevur hollan og dagførdan kunnleika innan byggiøkið.
- at tú hevur viðkomandi starvsroyndir.
- at tú dugir nakað av støddfrøði.
- at tú hevur teldukunnleika.
- at tú dugir væl at arbeiða við ungdómi.

Vit bjóða:
- eitt spennandi og avbjóðandi starv saman við royndum starvsfeløgum.
- møguleika fyri dagføring og eftirútbúgving innan økið.
- løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Tú:
- kanst venda tær til Sigurd Vatnhamar, leiðandi lærara, á timburdeildini tlf. 521106, um tú vilt vita meiri um starvið.
- skal senda okkum tína umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir innan 3. jan. 2007 til Tekniska Skúlan í Tórshavn, Postboks 3239, 110 Tórshavn.

Størvini, sum umfata undirvísing av bæði húsasmiðum og snikkarum, skulu setast ávikavíst 1. februar og 15. februar 2007. Til fasta starvið eru fyrstu 2 árini royndartíð, har tú, sum settur verður í starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg námsfrøðiliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

*Timburdeildin á Tekniska Skúlanun í Tórshavn tekur sær av undirvísing av húsasmiðju- og snikkaralærlingum og SIT-næmingum.*
*Eisini undirvísa lærararnir á eftirútbúgvingarskeiðum og teimum víðari útbúgvingum, sum skúlin hevur.*
*Á deildini starvast 8 lærarar og ein verkvørður.*

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Kunngerð

Almennu býráðsfundirnir hjá Tvøroyrar Býráð fyri 2007 eru ásettir til at verða: 12/1, 5/2, 5/3, 2/4, 7/5, 4/6, 3/9, 1/10, 5/11 og 3/12

TVØROYRAR KOMMUNA

**Lesið Sosialin - so eru tit við**